TILTØK

Gudstænastur 14. mars

Havnar kirkja: kl. 11
Niels Pauli Danielsen. Í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi gongur talvan fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar.
Hoyvíkar kirkja: kl. 11
Ann D. Hansen, talvan gongur fyri Neyðhjálp fólkakirkjunnar. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni.
Vesturkirkjan: kl. 11
Bergur D. Joensen, altarg.
Argja kirkja: kl. 11
Heri Joensen, altarg.
Nólsoy: kl. 12
Uni Næs, altarg.
Kirkjubøar kirkja:
Eingin gudstænasta verður
Tvøroyar kirkja:
Vegna jarðarferð er gudstænastan kl. 11 avlýst.
Gjógv: kl. 12
Emil Olsen, messa. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar.
Árnafjørður:
Meinhard Bjartalíð kl. 19
Kunoy: kl. 19
Emil Olsen
Skála: kl. 11
Símun P Jacobsen Talvan gongur fyri neyðhjálp fólkakirkjunnar
Sjóvar kirkja: kl. 12.10
Símun P Jacobsen altarg. Talvan gongur fyri neyðhjálp fólkakirkjunnar
Sandavágur: kl. 18
Bergur Debes Joensen. Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar.
Sørvágur: kl. 11
Inga Poulsen Dam
Kvívík: kl. 12
Theodor E. D. Olsen
Kvívík: kl. 17
David Johannesen. Eftir føstuguðstænastuna verður kirkjukaffi í Kirkjustovuni.
Christianskirkjan: kl. 11
Magnus Brahé Jørgensen. Talvan gongur til frama fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar.
Rituvíkar kirkja: kl. 11
Barna- og familjugudstænasta, Meinhard Bjartalíð.
Glyvra kirkja: kl. 11
lestur og sunnudagsskúli.
Søldarfjørður: kl. 11
lestur og sunnudagsskúli.
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10
Elsa Funding. Í Norðoya eystara prestagjaldi gongur talvan fyri Neyðhjálp fólkakirkjunnar/Breyð til Heimin.
Viðareiði: kl. 12
Elsa Funding, altarg.
Tjørnuvíkar kirkja: kl. 12
Henning Bøgesvang, altarg.
Elduvík: kl. 12
John Myllhamar
Kvívík: kl. 17
David Johannesen. Eftir føstuguðstænastuna verður kirkjukaffi í Kirkjustovuni.
Haldórsvík: kl. 12
Jógvan Fríðriksson, biskupur, altarg.,
Kvívík: kl. 12
Theodor E. D. Olsen
Í Norðstreymoyar prestagjaldi gongur talvan fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar.
Dalur: kl. 12
Jákup R. Hansen, altarg. Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldi fyri Breyð til Heimin

Argir, Kirkju- og missiónshúsið

Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Dan Eliasen, Tórshavn
Týskvøldið kl. 18.30
In-Between. Kl. 20
Argjakórið venur.
Kl 20.30 Ungdómsmøti.

Adventkirkjan

Leygardagin kl. 10 bíbliusøgutími fyri børn og bíbliugransking. Kl. 11 Gudstænasta Jens V. Danielsen.

Konsertfelagið skipar fyri konsert við accordeonleikara og violinleikara

Týsdagin 16. mars kl. 20
í Listaskálanum á Sandi.
Hósdagin 18. mars kl. 19.30
í Norðurlandahúsinum
Sunnudagin 21. mars kl. 16
í Mentanarhúsinum í Fuglafirði

Katólska kirkjan

Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.

Fríkirkjan Oasan

Kirkjustræt
Fríggjakvøldið onki after8 vegna legu.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Harald Haraldsen. Kl. 12 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsinum við Landavegin

Sunnukvøldið møti kl. 18.

Aglow Tórshavn

Møti verður í hølinum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30 við luttøku úr eysturoynni.
Hjartaliga vælkomin.

Ebenezer

Fríggjakvøldið kl. 20 Møtirøð við Zacharias Zachariassen og John í Skemmuni. Evnið er 'Ísrael og hin stóra trongdin'
Leygarkvøldið kl. 20 Møtirøð við Zacharias Zachariassen og John í Skemmuni. Evnið er '1000 ára ríkið'
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Zacharias Zachariassen og John í Skemmuni tala. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 12 Sunnudagsskúli.
Kl. 18 Møtirøð við Zacharias Zachariassen og John í Skemmuni. Evnið er 'Nýggjur himmal og nýggj jørð'. Barnaansing er meðan møti er.

Fríkirkjan Oasan

Kirkjustræt
Fríggjakvøldið kl. 19.30
Verið hjartaliga vælkomin.

Samkoman Immanuel,

Brekkutún 5, Hoyvík
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, børn 8-12 ár. Øll verða koyrd heim eftir møtið. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomn øll somul.
Sunnudagin kl. 11.30
Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/sunnudagsskúla. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum.

Lívsins Orð

Sunnudagin kl.10.30 Møti v/Kára Jacobsen
Húsmøtir
Fríggjakvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Hargar & Marinnu Hansen, Æðuvík.
Leygarkvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Jan & Eydnu Joensen, Glyvrar

Filadelfia, Landavegur 22

Leygarkvøldið kl. 21 Flare – Heðin Lamhauge talar.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti – Jónfinn Petersen talar.
Kl. 17.30 samkomuveitsla – kostn. kr. 225,- pr. persón – tilmelding á 234828.
Mánakvøldið
kl. 20 Bønarskúlin.

Samkoman Marknagil

Fjalsgøta 2, Tórshavn
Sunnudagin kl. 10.30
Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

Frelsunarherurin Tórshavn

Leygardagin
Kl 19.30 Aglow
Sunnudagin
Kl 11 Morgunmøti v/sunnudagsskúl
Kl 17.30 Bønarløta
Kl 18 Møti

KFUM og KFUK í Tórshavn

Mánadagin 15. mars
kl. 15.00 í KFUK:
Seinnapartsamkoman við Almu Bjartalíð.
Týsdagin 16. mars
kl. 16.30 í KFUK:
Várgleði fyri børn og juniorar.
Mikudagin 17. mars
kl. 19.00 í KFUM:
Ten-sing kórið venur. Drekka eftir føstugudstænastuna í Vesturkirkjuni.

Evangeliihúsið, Tróndargøta

Sunnudagin kl. 11familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Bjørt Miðberg og Maria Nolsøe tala.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti

Lívdin

Sunnudagur í skúlanum við Løgmannabreyt. Familjumøtið kl. 10.30, tilbiðjanarmøti kl. 11 og lovsongur og tala kl. 12. Sunnudagsskúli kl. 12.
Á familjumøtinum verður evnið "Rúmdin", Jens Wang talar. Tá tilbiðjannarmøti byrjar kl. 11 kunnu børnini fara í barnaansing og onnur kreativ tiltøk. Á seinna møtinum, sum er kl. 12, verður evnið "2010 familjan, at vera einstakur", Poul Guttesen talar. Vit bjóða tær at verða hjartaliga vælkomnan á møti. Sunnudagar hoyrast møtini beinleiðis við at fara inn á heimasíðuna.

Meinigheitshúsinum í Havn

Leygardagin kl. 13
Kvinnur í bøn.
Sunnudagin kl. 14
Sunnudagsskúli. Kl. 17
Møti v/ Meinigheitskóriðunun.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoman yviri við Strond

Sunnudagin kl. 18
Evangelisk møti.
Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Miðvágs Missiónshús

Sunnukvøldið kl. 18 møti v/Leivur Nattestad. Hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin Vágur

Sunnudagin kl. 11 sunnudagsskúli. Kl. 18 evang. møti v/Eingrím Holm og øðrum.
Øll eru vælkomin.
Mánakvøldið kl. 20 bønarløta
Týsdagin kl. 9.30 orðið á borðið. Kl. 20 Heimaforbund.

Missiónshúsið í Sørvági

Sunnudagin kl. 16 Familjumøti. Barnakórið syngur og dansar. Øll eru vælkomin.

Saron Vestmanna

Sunnudagin
kl. 11 Morgunmøti

Leynar

Missiónsvikan byrjar í skúlanum 12-14 mars.
Fríggjakvøldið kl. 20
møti við Tórhild Bjarkhamar. Sangur við Tórhild og Ingu.
Leygarkvøldið kl. 20
møti við Pól Johannesen. Sangur við Monnum úr klaksvík. Innsavnan.
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Thomas Dam. Sangur við Petur Hans og Thomas. Innsavnan.

Kollafjarðar Missiónshús

Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14 og møti kl. 18.
Týskvøldið kl. 20 verður bíbiltími v/Tom Skaale.
Øll eru hjartaliga vælkomin

Hvalvíkar missiónshúsið

Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30 og møtið við Tórfríða Magnussen og øðrum úr Lamba kl. 18. Øll eru vælkomin.

Kambsdalur, Handilsskúlin

Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting.
Týskvøldið kl. 20
Bønar- og uppbyggingarmøti.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum

Fríggjakvøldið kl. 21
Ungdómsmøti v/Jógvan Højgaard. Evni: Tor at liva kristna lívið.
Sunnudagin kl. 17 Felagsmøti v/ Joan Simonsen Greiðir frá volantørtíðini í Tanzania. Innsavan til ljóðføri til meinigheit í Tanzania. Um tær manglar fart, so ring á tlf. 447090 ella 775091.

Bygdalegan fyri Skála og Skálafirði

verður í Leguhúsinum í Nesvík. Vikuskifti 9-11 apríl. Aðrar familiur sum hava tilknýti til bygdirnar eru vælkomin at vera við. Tekning fer fram hjá Jóhannu á tlf 270293.

Keldan, Skálafirði

Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Ingibjørn Royðutoft
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Sangur við Rakul Petersen. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.

Lívsins orð, Saltangará

Møtirøðin ein nýggj byrjan, evangelisk møtir við Kristian Hedegaard, Karsten Jespersen frá Uganda Child Care o.ø verður fríggjakvøldið kl. 20.
Leygarkvøldið kl. 20 og sunnumorgun kl. 10.30.
Húsmøtini hjá Jan Joensen, Glyvrar & Hargar Hansen Æðuvík verða av somu orsøk avlýst.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Karmel, Eiði

Sunnukvøldið kl. 19
Møti við Egil Joensen

Oyndarfjørður

Familjumøti verður í missiónshúsinum sunnudagin kl. 16.
Manskórið í Leirvík luttekur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Leirvík

Sunnudagin kl. 14.30 verður sunnudagsskúli og kl. 18 verður møti við Absalon Matras v.fleiri.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

KFUM & K í Klaksvík

Sunnudagin
kl.14.00 Sunnudagsskúli
kl.17.30 Bønarløta
kl.18.00 Familjumøti við ungum úr Solo Deo Gloria.
Barnakórið í húsinum syngur kl. 21.00 Ungdómsmøti.

Soli Deo Gloria

Sunnukvøldið kl. 18
møti v/ Njál Djurhuus og Palla Petersen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið Tvøroyri

Leygardagin kl. 14
sangvenjing.
Sunnudagin kl. 14
sunnudagsskúli, møti kl. 18 við Terja Nielsen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Týskvøldið kl. 20 verður bíbliutími og bønarløta.

Missiónshúsið í Sumba

Familjumøti verður sunnudagin kl. 16 við Jógvan Højgaard.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Bygdarhúsið/Lopra

Sangløta - leygardagin 13 mars kl. 20.
Felagssangur, drekkamunnur, solosangir við m.a Svein Petersen, Rakul Bærendsen, Finnbjørn Nielsen, Eddie Bech og Otto West.
Sunnukvøldið kl. 20 møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

Gongutúrur

Sunnudagin kl. 10 verður gongutúrur: Hægstafjall, Tjørnudalur og Torvadalur í Vík. Hesin túrurin er eitt sindur yvir miðal. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við. Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

Tilhaldið í Tórsgøtu

tlf: 316491/286491
T-postur: tilhald@torshavn.fo
Opið er mánadag til hósdag kl. 09-17 og fríggjadag kl. 09-16.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Innbjóðing Føðingardagur fríggjadagin 12. mars kl. 15.
Skrá: Felagssangur: Nú nælir og grør. *Vælkomin:* Jákup Lindenskov, nevndarformaður í Tilhaldinum. *Felagssangur:* Vár við lýggjum vindi.
Gestarøðari: Dávur Winther, mentunarleiðari í Klaksvíkar kommunu. *Felagssangur:* Nú stríkur vár um heimlandsvøll.
Við flyglið. Óli Vang. ***Øll eru hjartaliga vælkomin at fáa sær ein drekkamunn í kjallaranum og á 1. hædd***
Fríggjadagur
Kl. 14 Nevndarval.
Mánadagur
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 10 Fimleikur, Grete Ellingsgaard.
Kl. 11 Enskt talumál.
Kl. 11 Máling og tekning, Arngerð Joensen.
Kl. 14 Kortspæl og onnur spøl.
Týsdagur
Kl. 10 Vit syngja, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 14 "Tað gráa gullið". Eyðun Andreassen, fólkalívsfrøðingur. Øll eru vælkomin.
Mikudagur
Kl. 9 Maskinbinding, Marita Guttesen.
Kl. 9 Veving, Joana Bjarnastein.
Kl. 9 Bindiklubburin.
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 10 Hosu- og tólvtáttabond, Dagny og Rasmus Lassen.
Kl. 10 Bindiklubbur.
Kl. 10-13.30 Matgerð, Bjørk Hendriksen. Nøkur pláss eru. Tilmelding: 316491.
Kl. 14 **Túrur:** Inn á Gøtu.
Øll eru hjartaliga vælkomin. Randi og Elisabeth, fysioterapeutar.
Kl. 15 Fimleikur, Dánjal Húsgarð. Allir menn eru hjartaliga vælkomnir.
Hósdagur
Kl. 9-11.15 Bólkur 1, Tekstviðgerð grundskeið, Páll Poulsen.
Kl. 11.45-14 Bólkur 2, Tekstviðgerð víðkað skeið, Páll Poulsen.
Kl. 14.15-16.30 Bólkur 3, Leita og samskifta á alnótini, Páll Poulsen. Nýtt skeið í at leita og samskifta á álnótini. Tilmelding: 316481 ella støkk inn á gólvið.
Kl. 10 Fimleikur, Greta Ellingsgaard
Kl. 11 Lesibólkurin: Vit lesa: "Shamanen" Noah Gordon. Hittast 8. apríl. Vit halda til á bókasavninum. Øll áhugaði eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 14-16 Boccia í kjallaranum. Alma Poulsen.
Fríggjadagur
Kl. 9 Bindiklubbur.
Kl. 10 Matgerð, Bjørk Hendriksen.
Kl. 14-16 Prát.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Eldrafelagið Kumlá á Skála

hevur hugnakvøld týskvøldið 16. mars kl. 19.

Tilhaldið Hugnin í Sandoy

hevur opið mánadag, mikudag og hósdag frá kl. 13 til 17. Allar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin 15. mars boccia vit í kjallaranum.
Mikudagin 17. mars Marita Thomsen, fótterapeutur kemur at greiða frá um týdningin av at røkja føturnar.

Pensionistafelagið í Havn

Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Telefon: 22 27 33
E-mail: finnurj@post.olivant.fo